# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



# Realskúlaflokkur í 1966

Her eru tvær myndir frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Ovara myndin er av einum realskúlaflokki í 1966. Niðara myndin er tikin, tá klassin hittist aftur 23 ár seinni, í 1989.

**Aftasta rað f.v.:** Sólgerð Jacobsen, Elsa Bærentsen, Høgni Bærentsen, Tóri í Hoyvík, Øssur Simonsen og Høgni W. Larsen.

**Miðraðið f.v.:** Mortina Jacobsen, Gunnvá Bærentsen, Marjun Huusgaard, Hjørdis Samuelsen, Tummas Napoleon Djurhuus, lærari, Hjørdis Hanusson, Eydna Egholm, Poulina Jacobsen, Gudny Gunnarsson og Heri Jacobsen.

**Fremsta rað f.v.:** Birgit Arge, Ella Smith, Marita Christiansen, Sam Jacobsen, Eyðun Huusgaard og Kristian á Dul.



**Aftasta rað f.v.:** Sólgerð Jacobsen (Mortensen), Elsa Bærentsen (Mortensen), Høgni Bærentsen, Tóri í Hoyvík, Øssur Simonsen og Høgni W. Larsen.

**Miðraðið f.v.:** Mortina Jacobsen (Petersen), Gunnvá Bærentsen (Mortensen), Marjun Huusgaard (á Fløtti), Hjørdis Samuelsen (Reinert), Tummas Napoleon Djurhuus, lærari, Hjørdis Hanusson, Eydna Egholm (Bech), Poulina Jacobsen, Gudny Gunnarsson (Monro) og Heri Jacobsen.

**Fremsta rað f.v.:** Birgit Arge, Ella Smith (Clementsen), Marita Christiansen, Sam Jacobsen, Eyðun Huusgaard og Kristian á Dul.

Um onkur hevur hug at ongna sær hesar myndir er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (Ovara myndin nr. 418, niðara myndin nr. 419)

*Myndaeigari: Elsa Mortensen*

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu,
tá ið kæra kona, mamma, vermóðir, omma
og langomma okkara

**Kirstin Henriksen**
á Dul, Strondum

andaðist og varð jarðað.
Vit takka Jógvan presti og Jóhan fyri troystarrík orð
í heimi og kirkju. Tøkk kirkjutænarar og sangarar og
øll tit, sum stukku inn á gólvið, og tit, sum hjálptu
við jarðarferð og ervi.
Tøkk øll tit, sum fylgdu Kirstin til hennara
seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Jeffrei**
**Elin og Hervør**

**Dagurin**
**9. september. Gorgonius**, deyður umleið ár 300. Ein av pínsluváttunum í fornkirkjuni, sum varð tikin av døgum undir Diocletianus keisara.